


Idun Viking er eitt av trimum veitingarskipum hjá Viking-reiðarínum sum nú liggur fyri teym. Mynd: Viking Supply Ships

# Viking: Umhugsa at leggja allar supplybátarnar

**Jógvan Hugo Gardar**

13.11.2015 - 17:12

Oljan.fo

Frálandareiðaríið Viking Supply Ships hevur niðurskrivað virði á skipunum hjá sær við 187 milliónum norskum krónum í triðja ársfjórðingi. Reiðaríið hevur heimstað í Gøteborg.

Reiðaríið hevur 18 skip, harav eru fimm veitingarskip (PSV). Av hesum eru longu tríggir lagdir vegna kreppuna í oljuvinnuni. Sambært Finansavisen umhugsar leiðslan í Viking Supply Ships eisini at leggja tey bæði seinastu.

PSV-skipini hjá Viking eita: Frigg Viking, Idun Viking, Nanna Viking, Freya Viking og Sol Viking.